# Landsstýrið slept øllum eftirliti við Vágatunnilin

*–Nýggi Landsverkfrøðingurin er komin í nevndina fyri P/F Vágatunnilin, samstundis sum hann skal hava eftirlitvið arbeiðnum. Sostatt skal hann nú hava eftirlit við sær sjálvum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað hevur vakt ans, bæði í byggivinnuni og hjá politikarum, at nýggi Landsverkfrøðingurin, Oyvindur Brimnes, er komin í nevndina fyri P/F Vágatunnilin.

Tí samstundis stendur í lógini fyri Vágatunnilin, at tað er Landsverkfrøðingurin, sum skal hava eftirlitið við arbeiðnum vegna Føroya Landsstýrið og Føroya Løgting.

Tí eru tað mong, sum halda, at Landsverkfrøðingurin átti at hildið seg langt vekk frá einum nevndarsessi í P/F Vágatunlinum.

Men nú, hann er komin í nevndina, fær hann at fáa álvarsligar gegnistrupulleikar, tí nú er hann komin sær sjálvum í eina støðu, har hann í veruleikanum skal hava eftirlit við sær sjálvum.



*Hvussu kann fólkið hjá Landsverkfrøðinginum hava eftirlit við einum arbeiði, sum teirra egni stjóri er ein týðandi partur í, spyr Heini O. Heinesen, sum umhugsar at reisa ein skrivligan fyrispurning í tingi*

Hetta eru tað bæði fólk í byggivinnuni og politikarar, sum halda er ikki serliga álitisvekjandi.

**Fyrispurningur í tinginum**

Ein av teimum politikarum, sum var harðast ímóti at stovna eitt partafelag at gera undirsjóvartunnilin, var Heini O. Heinesen, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginginum.

Hann sigur, at tað, sum nú er hent, hevur bara sannført hann um, at hann var á rættari leið.

– Nú er sjálvur Landsverkfrøðingurin komin í nevndina. Men samstundis skal hann, sum almennur myndugleiki, hava eftirlitið við arbeiðnum fyri Landsstýrið og løgting.

– Og tað sigur seg sjálvt, at einum slíkum eftirlitið kann ongin hava álit á, sigur Heini O. Heinesen.

Hann heldur eisini, at hetta kann kom at skapa stórar trupulleikar innanhýsis á Landsverkfrøðingsstovninum, tí hann ivast í, hvussu tað fer at bera til hjá fólkinum har, at hava eftirlitið við einum arbeiði, sum teirra egni stjóri er blivin ein so týðandi partur í, sum tlaan er um í hesum føri.

Og við at lata seg velja í nevndina, hevur Landsverkfrøðingurin ikki bara skapt sær sjálvan ein gegnistrupulleika. Hann hevur givið øllum stovninum ein gegnistrupulleika, tí veruleikin er, við hesum hevur hann „likviderað“ sítt egna eftirlit.

Hann sigur, at Landsverkfrøðingurin var ikki í nevndini áður, so tað er púra burturvið, at velja hann í nevndina nú.

–Eftirlitið við einum slíkum arbeiði er ikki ein samráðingarspurningur, og tí er tað ein avgerandi fortreyt fyri eftirlitið, at tað er vatntætt skott ímillum eftirlitið og tann, sum skal standa fyri arbeiðnum.

Hann sigur, at hann metir málið so mikið álvarsligt, at hann umhugsar at reisa ein skrivligan fyrispunring til Finnboga Arge, landsstýrismann um hetta, tá ið løgtingið kemur saman aftur.

# Landsverkfrøðingurin: Tað er ongin trupulleiki

*– Eg dugi ikki at síggja, at tað skal vera nakar gegnistrupulleiki hjá mær at vera nevndarlimur í P/F Vágatunlinum, samstundis sum vit skulu hava eftirlitið við arbeiðnum, sigur nýggi Landsverkfrøðingurin*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nýggi Landsverkfrøðingurin, Oyvindur Brimnes, dugir ikki at síggja nakran sum helst trupulleika við, at hann er blivin limur í nevndini fyri P/F Vágatunlinum, samstundis, sum hansara stovnur skal hava eftirlit við arbeiðnum vegna Landsstýrið og sostatt, eisini vegna løgtingið.

Hann sigur, at hann er ikki rættiliga greiður yvir, akkurát, hvussu eftirlitsskyldan er orðað.



*– Eg dugi ikki at síggja, at Landsverkfrøðingurin og P/F Vágatunnilin er mótpartar, hóast Landsverkfrøðingurin skal hava eftirlitið við Vágatunlinum, sigur Oyvindur Brimnes, nýsettur Landsverkfrøðingur og nývaldur nevndarlimur í P/F Vágatunlinum*

–Vit hava ikki havt fyrsta nevndarfundin enn og tað er m.a. tað, sum greiðast skal fáast á á tí fundinum.

Men sum hann hevur skilt tað skal Landsverkfrøðingurin tryggja, at arbeiðið, tekniskt er á nóg høgum støði.

–Annars eru tað eisini privat felag, sum skulu hava tekniska eftirlitið við arbeiðnum.

Annars heldur Oyvindur Brimnes ikki, at talan verður um nakran gegnistrupulleika.

– Uppgávan hjá bæði Landsverkfrøðingsstovninum og P/F Vágatunlinum er tann sama, nevniliga at fáa ein so góðan tunnil sum gjørligt, so bíliga sum gjørligt: Ella við øðrum orðum, at fáa sum mest fyri pengingin.

– Tí er sum so ongin andsøgn í endamálinum hjá Landsverkfrøðinginum og hjá Vágatunlinum.

Hann heldur, at uppgávan hjá Landsverkfrøðingsstovninum verður líka nógv at verða ráðgevari hjá byggiharranum.

Hann vísir m.a. til vanliga vegagerð í Føroyum.

– Har er tað Landsverkfrøðingurin, sum ger vegirnar, samstundis sum hann er vegamyndugleiki. Hetta er onki øðrvísi enn tað, leggur hann afturat.

Oyvindur Brimnes heldur ikki at gegnistrupulleikar fara at stinga seg upp uttan so, at ósemja fer at taka seg upp í millum Landsverkfrøðingsstovnin og nevndina fyri P/F Vágatunlinum.

–Men so er onki at gera uttan at halda seg uttanfyri viðgerðina av akkurát teimum málunum, sum ósemja er um.

*Í sambandi við vegagerðina hevur Landsverkfrøðingurin mælt til at taka av lægsta tilboði hjá Byggitek, men tað er ongin loyna, at nevndin fyri P/F Vágatunnilin er mest áhugað í tilboðnum frá J&K Petersen.*

*– Er tað ikki skjótt, at tú kanst enda í eina støðu, har tú kemur at arbeiða beint ímóti tilráðingini hjá Landsverkfrøðinginum?*

– Nú eri eg ikki blivin Landsverkfrøðingur enn.

– Men í slíkum førum kann eg ikki vera við til at taka avgerðirnar, so har má eg halda meg frá at taka lut í viðgerðini.

Men hann heldur, at slíkar avgerðir eru ikki høvuðsendamálið hjá nevndini, tí tað er bara ein heilt lítil partur av eftirlitinum.

– Eg dugi ikki at síggja, at eftirlitið skal vera mótparturin hjá byggiharranum.

– Eg ivist ikki í, at eisini P/F Vágatunnilin hevur áhuga í, at eftirlitið er so gott sum gjørligt.

Oyvindur Brimnes hevur fylgt við í tí, sum er hent í málinum um Vágatunnilin hesa seinastu tíðina og í kjakinum, sum hevur verið í kjalarvørrinum á teimum avgerðum, sum eru tiknar.

Men hann vil ikki gera viðmerkingar til tað, sum er farið fram.Hann tekur við sum Landsverkfrøðingur 1. august.



# Tórshavnar Manskór til kór-OL



*Fríggjadagin fer Tórshavnar Manskór við Norrønu við kós móti Linz í Eysturríki. Teir skulu í døgunum 12. til 16. juli vera við í fyrstu kór-olympiaduni saman við 350 øðrum kórum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað vera ikki eiti á tónar, sum fara at streyma úr eysturríkiska býnum Linz í døgunum 12. til 16. juli. Tá verður býurin vertur fyri ikki færri enn 18 túsund kórsangarum, sum verða við í allarfyrstu kór-olympiaduni.

Sjálvandi verður eisini eitt føroyskt kór við. Nú er tað skjótt bara ”tann rætta” OL-kappingin í ítrótti, sum vit ikki sleppa at vera við í, tí bæði tá tað umrædur talv og t.d. kórsang, eru vit við. Kórið, sum umboðar Føroyar er Tórshavnar Manskór. Tað var Undirvísingar- og Mentamálastýrið sum heitti á kórið um at taka dystin upp, og tað lat kórið sær ikki siga tvær ferðir. Tað er kanska tí, at kórið hevur verið í vási fyrr. Fyri einum ári síðani ella so, var Tórshavnar Manskór við í stórari kapping í Wales, so teir vita, hvat tað snýr seg um, tá til stykkis kemur.

Ta ferðina gjørdist kórið nummar seks av trettan kórum, og tá hugsað verður um støði, so eru kórmenninir sera væl nøgdir.

Jørgin Johannesen, talsmaður fyri kórið, sigur, at ta ferðina var støði heilt óvanliga høgt og kórini sera professionel. – So vit vóru meiri enn nøgdir við sætta plássi, sigur hann.

Hóast talið av kórum er stórt, so er bólkurin, sum Tórshavnar Manskór skal kappast í, ikki so stórur. Níggju kór eru í bólkinum og tey skulu syngja í 20 minuttir hvørt. Á skránni hjá okkara monnum eru fýra sangir, og eru tað »Vit eru føroyingar« hjá Regini Dahl og Kára Bæk, Orðini, sum Rói Patursson eigur, og sum Bjarni Restorff hevur útsett, Jeg vil mig Herren Lofve, sum Bjarni Restorff eisini hevur útsett og Landkenning eftir Edvard Grieg.

– Sangirnir eru nokk so drúgvir, men tað er ein spennandi skrá, sigur Jørgin Johannesen, sum annars greiðir frá, at teir eru komnir beinleiðis í annað umfar. – Tað er so, at tá tú kemur, sum alment umboð fyri eitt land, so kemur tú beina leið í annað umfar, og í hesum føri eru vit alment umboð, greiðir Jørgin frá.

Tórshavnar Manskór skal ikki bara framføra ta einu ferðina. Sum alment umboð skulu teir eisini hava tríggjar aðrar framførslur, sum m. a. vísa mentanina í tí landinum teir koma frá. – Ætlanin var, at vit skuldu hava tvær framførslur, men tað er í seinastu løtu vorðið til tríggjar. Harumframt skulu vit eisini vísa føroyskan dans – bæði vanligan og dansispøl, sigur Jørgin, sum leggur afturat, at tí verður tað ikki ein avslappingartúrur.

Konur og dámur hjá kórsangarum eru við á ferðini og sum skilst, skulu tær vera við til tann føroyska dansin. Tóshavnar Manskór leggur frá landi tíðliga fríggjadagin. Farið verður við Norrønu til Hanstholm haðani teir koyra til Midtfyn. Har skulu teir vitja Søllinge Manskor, sum er eitt manskór við eldri monnum – pensjonistum. Sunnukvøldið hava teir so eina framførslu saman í Nørre Lyndelse kirke, og tað má so sigast at vera venjingardysturin á ferðini …

Mánadagin fer kórið í bussi til Linz í Eysturríki, har kórolympiadan verður sett mikudagin í næstu viku. Tað er ikki smávegis tað kostar, tá eitt so stórt kór skal avstað. Jørgin Johannesen sigur, at túrurin kostar onkustaðni ímillum 550 og 600 túsund krónur. Megin-partin hava kórsangararnir sjálvir goldið, men ein triðing hevur tað eydnast at fáa til vega við faldarum og stuðli. – Lýsararnir vóru sera hjálpsamir tá vit gjørdu faldaran og so hava vit eisini fingið stuðul úr Mentunnargrunni Føroya Løgtings, frá UMMS og frá Tórshavnar Býráði, sigur Jørgin Johannesen, sum í tí sambandi takkar stuðlunum.

Sum nevnt verða 350 kór við. Tað svarar íalt til umleið 18 túsund luttakarar og teir koma úr 60 londum. Tey 350 kórini skulu kappast í 28 bólkum og vit ynskja Tórshavnar Manskóri góða ferð og ikki minni góða eydnu.




**GLAÐING**

- føroyska mánaðarblaðið er at fáa á hesum støðum:

**Norðoyggjar:**
Shell Quick Service, Stangavegi, Klaksvík
Statoilstøðin, N. Pálsgøtu, Klaksvík
Kioskin hjá Ann, Klaksvíksvegi, Klaksvík
Kioskin v/ Andreu Gaard, Klaksvíksvegi 59, K.
Tuck Shop, Klaksvíksvegi 65, Klaksvík
Kiosk Sigrið, Klaksvík
Hotel Norð, Viðareiði

**Eysturoy:**
Shell-støðin á Oyrarbakka
Statoil, Skálabotni
Statoil, Heiðavegi, Saltangará
Statoilstøðin á Strondum
Kiosk Vár, Runavík
Kioskin við Toftagjógv, Toftir
Shell-støðin í Gøtudali
FK, Fuglafirði
Joma, Skála
Stranda Centrum

**Norðstreymoy:**
Shell-støðin inni á Fjør, Vestmanna
Statoil-støðin, Kollfjarðadali
Hjá Børge, Kollafjørður

**Tórshavn/Argir:**
H. N. Jacobsens bókahandil
Hjalmar Jacobsens bókahandil
Bókasølan í SMS
Bónus
FK-Hoyvík
FK, Dr. Jacobsensgøta
Kiosk Activ
P. A. Restorff
Ternubúðin
Frants Restorff, bakarí
Hjá Gunnleivi, Landavegi
Hjá Gunnleivi, Hoyvíksvegi
Shell við Norðara Ringveg
Statoil-støðin í Gundadali
Hornið, SMS
Bakaríið Mylnan
Kiosk Sentrum, Handilskjarnin
Kiosk Svalin
Video 2000, Per Mohrsgøtu, Hoyvík
Kioskin í Hoyvík, Hvítanesvegi
Hornabúðin, J. Dalsgøta, Hornabø
Bónus, Smyrilsvegi
Garðsbúðin, Argir
Argjabúðin, Argir
Statoil-støðin, Argir

**Vágar:**
Kafeteria á flogvøllinum
Myllan, Miðvági
FK Vágar, Miðvági

**Nólsoy:**
Hjá Anfinn

**Sandoy:**
Shell-støðin, Sandur
Statoil-støðin,Sandur

**Suðuroy:**
Tangabúðin, Tvøroyri
FK, Trongisvági
Shell-støðin á Oyri, á Bakka, Vági
Fa. Dahl, v/ Solveig Johansen, Vági

Sosialurin - 31820